## DAGSINS MEINING

# Hvør eigur ílegurnar?

Ílegugranskingin mennir granskingarumhvørvið og fjøltáttar vinnulívið. Soleiðis verður lógin um ílegugransking lýst av teimum avvarandi. Herum er eingin ivi! Talan verður um trýggar skráir á teldustøði nevniliga vevnaðarskráin, diagnosuskráin og ættarbandsskráin. Henda granskingarætlan verður lýst sum ein vinnulig ætlan. Av tí, at útlendskar heilivágsfyritøkur hava stóran áhuga í okkara ílegutilfari, eru nógvir pengar í øllum hesum. Undir framløguni í Almanna- og heilsumálaráðnum var nógv gjørt burturúr vinnumøguleikum og trygdini. Tað er gott. Tilfarið verður gjørt navnleyst, soleiðis at eingin skal kunna misnýta hetta ílegutilfar. Tað er sjálvsagt.

Ílegugransking reisir nógvar etiskar spurningar, sum ikki tykjast at hava tann stóra áhugan hjá almenninginum. Fokuserað verður á gransking, trygd og búskaparligan vinning. Búskaparligur vinningur liggur frammaliga í huganum á politikkarum og embætismonum. Tað er, sum um alt glíður betri niður, um eitt torført mál hevur eina positiva búskaparliga síðu. Men hvat við teimum etisku síðunum og hvat við rættindum til ta kunning, sum goymir seg í føroyska genetiska arvinum? Eftir nøkur ár við ílegugransking verður savnað saman ein stór mongd av kunning um føroyskar ættir, núlivandi og komandi føroyingar. Her kann vera talan um heilsuupplýsingar av áhuga fyri arbeiðsgevarar og tryggingarfeløg. Her kann verða talan um stórar lívfrøðiligar freistingar og etiskar avbjóðingar.

Hvussu fara fólk at reagera, tá øll vitan t.d. um fostrið í móðurlívið er tøk? Hvussu fara vit at reagera, tá vit við vissu kunnu fáa at vita, hvussu leingi vit fara at liva? Hvat skulu allar upplýsingarnar brúkast til? Hvør skal sleppa at brúka tær og hvør skal hava vinningin? Hvør eigur ílegurnar? Tann einstaki føroyingurin? Hvør skal taka avgerðir fyri børnini? Hvat við kanning av børnum - hvør skal taka avgerðirnar? Hvussu við tí tilfari, sum longu nú í áravís er farið av landinum við blóðroyndum av nýføðingum? Hvør hevur "copyrættin"? Hvussu eru vit fyri at taka avgerðir, tá vit skulu geva vísindafólki og multinationalum fyritøkum loyvi at granska í okkara ílegum? Hvør skal ráðgeva? Hvussu skal tann kunning um føroyska genetiska arvin, sum verður savnað í Ílegusavninum gevast? Hvussu tryggja vit okkum, at tann vitan um sjúkur og sjúkuupprunar, sum er goymd í okkara genetiska arvi, verður nýtt á ein ábyrgdarfullan og etiskt forsvarligan hátt? Tær multinationalu heilivágsfyritøkurnar eru ikki júst kendar fyri teirra høga moralska støði ella fyri at vísa vælvild mótvegis eitt nú menningarlondunum, har fólk ikki hava ráð at keypa heilivág, sum hjá okkum er gerandiskostur. Hvør skal hava vinningin? Hvør skal fáa virðisøkingina? Heilsuliga vinningin fær í princippinum øll mannaættin, men er tað so einfalt, tá vit hugsa um, hvussu tær multinationalu bera seg at?

Vit ganga út frá tí etiska støði, sum er galdandi í dag. Men hvussu er myndin um tíggju, tjúgu ella um fimti ár? Fara myndugleikar at standa móti trýstinum frá einum ídnaði, sum vil sleppa at nýta kunningina frá okkara genetiska arvi á ein heilt annan hátt enn í dag? Nærkast vit ikki eini støðu, har menniskjan fer at spæla Gud? Alt er nú møguligt. Hussu leingi megnar vísindaliga umhvørvið at standa ímóti einum vaksandi trýsti frá vinnulívinum? Sjálvandi skulu vit hava ílegugransking í Føroyum. Sjálvandi skulu vit vinna pening úr hesi gransking. Sjálvandi skulu vit sum av landafrøðiligum og søguligum orsøkum eru sermerkt og áhugaverd í hesum granskingarhøpi bjóða okkum fram til gagns fyri alla mannaættina. Men tað hevði sømt seg við einum breiðum samfelagsorðaskifti um allar teir etisku spurningar, sum loga upp við hetta stóra mál. Hetta orðaskifti hava vit ikki havt, og tað er eitt álvarsamt brek við hesum kanska tí størsta máli, sum nakrantíð hevur verið á fyri á okkara meira enn túsundár gamla løgtingi.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Illa stendur til, tá veruleikin gerst eitt haft

**Áki Andreasen**



Eg má hava rakt við ringu samvitskuna hjá sambandsmonnunum, Johan Dahl og Helga Abrahamsen. Um framt at oddagreinin í Dimmalætting 21. februar avdúkaði skitnu vápnini hjá Sambandsflokkinum.

Ein afturvendandi trupulleiki hjá sambandsfólki, og hjá Sambandsflokkinum er, at veruleikin gerst eitt haft og ein marra. Tað gerst ein bági hjá sambandsstuðlum tá tað ferð eftir ferð vísir seg at føroyskar loysnir eru við til at menna samfelagið og at leggja lunnar t.d eitt føroyskt flogfelag.

### Politiskt snildi

Lønti floksskrivarin hjá Sambandsflokkinum vísir á, at Sambandsflokkurin og málgagn Sambandsfloksins ikki havi verið móti føroyska flogfelagnum. Hann vísir á at Sambandsflokkurin tvær ferðir hevur játtað flogfelagnum pening. Gaman í - atkvøddi Sambandsflokkurin fyri, men tað var bert fyri ikki at standa einsamallur, tí tað vildi verið ov avdúkandi. Sambandsflokkurin bleiv kroystur at atkvøða fyri - hann atkvøddi ikki fyri av vælvild, men reinum politiskum snildi.

Í staðin fór flokkurin í eina miðvísa herferð móti flogfelagnum. Málgagn Sambandsfloksins og við greinum sum t.d: "føroysk rullupylsa bjargar ongum flogfelag" og øðrum við, hevur herferðin verið førd fram.

### Tann bøtandi hondin og tann spillandi tungan...

Tað er beinleiðis margháttligt tá tingmaður sambandsfloksins nevnir orðafelli um ta bøtandi hondina og ta spillandi tunguna. Tá hann so nevnir tað í samband við eitt aftursvar til undirritaða viðv. Atlantic Airways - so tykir mær at tað má standa illa til tá veruleikin gerst eitt haft. Tí veruleikin er tann at, Johan Dahl hevur eitt ella annað endamál við at finnast at og seta føroyska flogfelagið í eitt ringt ljós, ikki tí - hann er í tí rætta flokkinum; men júst hvat endamálið er dugi eg ikki at síggja. Føroyska flogfelagið hevur givnar treytir at virka eftir. Leiðslan í felagum hevur ikki við einum einasta orðið grett um at vera ímóti einskiljing ella kapping á flogferðsluøkinum.

Tí tá talan er um flogferðslu á føroyskum veingjum hevur sambandsflokkurin og Johan Dahl ikki verið partur av tí bøtandi hondini, heldur hinvegin.

Sum toppurin á politisku kransakakuni hjá Sambandsflokkinum, hevði fyrrverandi løgmaður hjá flokkinum, føroyska flogfelagið á sølulista, sum partur av einari kreppuloysn - nei Sambandsflokkurin hevur ongantíð verið ímóti Atlantic Airways - góðan morgun Helgi Abrahamsen!

### Almennu Føroyar og vinnulívið

Guð viti nær tað gongur upp fyri monnum sum Johan Dahl, at hann situr í samgongu og hevur allar møguleikar fyri at ávirka, so at hann fær tær loysnir hann heldur vera tær skilabestu.

Johan Dahl, Helgi Abrahamsen og allur Sambandsflokkurin veit væl at undangonguflokkurin tá talan er um greiðan skilnað millum alment og privat hevur verið og er framvegis Tjóðveldisflokkurin.

Kreppuloysnirnar skulu ikki framhaldandi mynda føroyska vinnulívið.

Havi ikki møtt nøkrum sum metir at danskar kreppuloysnir eru ein varandi loysn.

Tað er ikki tað sum var kjarnan í mínari viðmerking til grein hjá Johan Dahl.

Eg meti ikki tað tænir Johan Dahl og Sambandsflokkinum til nakran sóma, framhaldandi at finnast at og niðurgerað føroyska flogfelagið, men tað stendur teimum frítt at gera tað - so halda teir eisini "sambandsstásið" viðlíka.

Avgerandi er, at ein einskiljing verður gjørd við gjøgnumskygni og ikki verður stýrd av vina - og kenningapolitikki.

### Gevist at renna undan veruleikanum!

Eg veit satt at siga ikki hvat meiningin er við skrivingarlagnum hjá Johan Dahl og sambandsstuðlunum. Fyrst ein grein, á tremur við atfinningum mótvegis Atlantic Airways, síðan ein onnur grein sum ber í bøtuflaka - sum endar við nøkrum spurninginum, har Johan Dahl væl kennir svarið. Floksskrivarin Helgi Abrahamsen kemur síðan við grein sum upp í saman berjist við veruleikan og endurtekur upp í saman: "Sambandsflokkurin var ikki móti Atlantic Airways".

Síðan ein oddagrein í Dimmalætting sum er á so lágum støði, at torført er at taka greinskrivaran fyri fult. Alt bert fyri at renna undan veruleika at Johan Dahl nýtir hvørt høvi hann fær at leggja eftir Atlantic Airways, á sama hátt sum málgagn sambandsfloksins og Sambandsflokkurin hevur gjørt síðan føroyska flogfelagið sá dagsins ljós.

So eg vil endaliga heita á tykkum: gevist við at renna undan veruleikanum, tí tá veruleikin gerst eitt haft um beinini á tykkum, er ilt at grundgeva og halda seg til kjarnina í málinum.

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Tóki Højgaard toki@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Teresa Jensen teresa@sosialurin.fo
Hjørdis Gregersen hjordis@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo
**Sosialurin í Vágum:**
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Føroyaprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]


**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.